# Roynt eigur at verða at fáa fatur á miðfláunum

**- Stór gil og rivur eru í støðum, men hesi vísa seg at ganga systematiskt. Tað hevur tí stóran týdning, hvussu tú kemur inn á hesar rivur. Verður borað paralelt við rivurnar, kann tað gerast torført at koma burtur úr teimum, segði Martin V. Heinesen, jarðfrøðingur, sum er í áhugabókinum, ið legði uppskotið fram um tunnil millum Skálafjørðin og høvuðsstaðarøkið**

TUNNILSSAMBAND
*Vilmund Jacobsen*

Á fundinum á Svangaskarði týskvøldið um undirsjóvartunnil millum Skálafjørðin og høvuðsstaðarøkið, greiddi Martin V. Heinesen, jarðfrøðingur, í stuttum frá jarðfrøðiligu viðurskiftunum á leiðini, har skotið verður upp at byggja tunnilin.

Hann legði dent á, at ongar veruligar kanningar eru gjørdar, men at hugt hevur verið eitt sindur at fyritreytunum.

### Miðfláirnar best

Martin vísti eitt einfalt kort yvir Føroyar og leiðina tvørtur um Tangafjørð, sum er fjørðurin millum Eysturoyarlandið øðrumegin og Hvítanes hinumegin. Hann hevði eisini eitt dýbdarkort av hesi leiðini, sum fólk kundu síggja.

- Ymiskt er, hvussu grótið er skikkað, men høvuðstrekkini ganga aftur. Vit hava tær tríggjar fláirnar; tær ovastu, miðfláirnar og so tær niðastu.

Jarðfrøðingurin segði, at flestu tunlarnir í Føroyum eru bygdir gjøgnum miðfláirnar, sum eru best egnaðar til tunnilsgerðir.

- Roynt verður tí at fáa fatur á miðfláunum, tá ið tunlar skulu byggjast, og hesar fláir hella í ein landsynning.

Hann vísti tó á, at tunnilin millum Hvalba og Trongisvág, sum tann fyrsti í Føroyum, liggur rættiliga niðarliga í flágunum, og tað sama er við tunlinum til Sumbiar, har stórir trupulleikar vóru við lendinum.




*- Tess longur norður á Tangafjørð, vit koma, tess betur sær út, tí her er størri møguleiki fyri, at vit skjótari fáa fatur á miðfláunum, sigur Martin V. Heinesen, jarðfrøðingur.*

### Norðrari er betur

Martin segði, at tess longur norður á Tangafjørð, vit koma, tess betur sær út, tí her er størri møguleiki fyri, at vit skjótari fáa fatur á miðfláunum.

Hann vísti á, at miðfláirnar fara í sjógv á Strondum, Saltnesi og á Sundi.

- So, her eru vit á markamótinum, sum hann tók til. Martin segði, at lendið um Hvítanesarleiðina er nakað "stokkið", og tað sama er galdandi á leiðini við Raktanga á Strondum og sunnanfyri Nes bygd. Eisini við Flesjarnar síggjast rivur.

- Stór gil og rivur eru í støðum, men at síggja til, ganga hesi systematisk. Verður rætt farið fram, kann byrgjast uppfyri tí mesta av tí, sum nú einaferð verður á leiðini. Men jú færri rivur eru, tess lættari er at koma ígjøgnum.

Torført er tó at siga, hvat kann stinga seg upp, tá ið tú arbeiðir í undirgrundini, har øll viðurskifti ikki eru kend til fulnar.

### Vinkulin stóran týdning

Hann segði, at tað hevur stóran týdning, hvussu vinkulin sær út, tá ið tú kemur á hesar rivur.

- Verður borað paralelt við rivurnar, kann tað gerast ein stórur trupulleiki, tí tá kann verða torført at koma burtur úr teimum aftur. Tí eiga vit at hyggja væl eftir, hvar hesar rivur eru, segði jarðfrøðingurin í áhugabólkinum, Martin V. Heinesen.

# Tunnilin gevur veldugar fyrimunir

**- Neyvari metingar og mátingar eiga at verða gjørdar til tess at fáa greiði á týdningarmiklum spurningum í samband við tunnilsætlanina, sigur áhugabólkurin í síni niðurstøðu**

TUNNILSSAMBAND
*Vilmund Jacobsen*

Í niðurstøðuni hjá áhugabólkinum verður sagt, at einki er til hindurs fyri at gera undirsjóvartunnil millum Skálafjørðin og Suðurstreym.

- Hesin tunnil gevur velduga stórar fyrimunir, bæði samfelagsliga, trygarliga, vinnuliga, samfelagsbúskaparliga og umhvørvisliga.



*Áhugabólkurin sigur, at ein kost-benefit kanning eigur at verða gjørd. Hendan skal vísa á leið, hvussu stóran samfelagsbúskaparligan týdning, eitt tunnilssamband millum Skálafjørðin og Suðurstreym kemur at hava.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Øllum til góðar

Símun Johanesen, bygdaráðslimur í Nes kommunu, sum stóð fyri høvuðsframløguni hjá áhugabólkinum, segði, at fyrimunirnir við tunlinum fara at koma tveimum triðingum av landsins borgarum til góðar, tá ið undirsjóvartunnilin um Leirvíksfjørð er komin.

- Men samfelagsbúskaparliga og umhvørvisliga koma hesir fyrimunir øllum landinum til góðar.

Símun helt, at metingarnar, sum áhugabólkurin hevur gjørt í samband við tunnilsuppskotið, eru rættiliga realistiskar.

- Men tær eru nakað feskar og eiga tí at verða gjøgnumgingnar kritiskt.

Hann vísti á, at lagt er upp fyri eini munandi øking í kostnaðinum samanborið við Vágatunnilin, og tí má hesin í útgangsstøðinum metast at liggja heldur høgt, heldur enn ov lágt.

- Kostnaðarmetingin er tó heft av ávísari óvissu, serliga við atliti til jarðfrøðisligu umstøðurnar á økinum, segði Símun.

### Metingar og mátingar

Í sínum tilmæli, sigur áhugabólkurin, at neyvari metingar og mátingar eiga at verða gjørdar til tess at fáa greiði á týdningarmiklum spurningum í samband við tunnilsætlanina.

Símun segði, at ein kost-benefit kanning eigur at gerast. Henda kanning skal vísa á leið, hvussu stóran samfelagsbúskaparligan týdning, eitt tílíkt samband veruliga kann fáa.

- Farleiðin til Havnar og við hesum eisini til Sandoyar og Suðuroyar gerst styttri fyri alla Eysturoynna, og somuleiðis verður styttri millum Skálafjørðin og Vágarnar.

Hann segði, at jarðfrøðisligar mátingar mugu gerast, sum kunnu vísa, hvar best er at byggja tunnilin.

### Ferðagjaldið lækkast

- Neyðugt verður eisini at gera metingar um fíggjarhátt, og tá serliga í hvønn mun tað almenna skal verða við til at fíggja verkætlanina.

Símun Johannesen segði at enda, at ein og hvør innskotskapitalur frá tí almenna vil merkja, at ferðagjaldið kann lækkast og harvið gerast minni, enn útrokningarnar vísa.



Tórsvøllur:

# Kostnaðurin fleirfaldaður

**Kostnaðurin at rigga Tórvøll til rennibreyt er vorðin átjan ferðir størri enn upprunaliga mett**

TÓRSVØLLUR
*Heri á Rógvi*

Í sínari tíð skuldi tað "bert" kosta eina hálva millión at gera Tórsvøll til reiðar at leggja rennibreyt rundanum fótbóltsvøll, og so skuldi kostnaðurin fyri sjálva breytina koma afturat.

Hetta framgongur í grein í Sosialinum 13. apríl 1999, har formaðurin fyri Tórsvallargrunnin, Poul Michelsen, verður endurgivin fyri at siga, at kostnaðurin fyri at flyta áskoðaraplássini, soleiðis at pláss verður fyri rennibreyt, skuldi vera ein hálv millión krónur.

Hetta tal er nú vorðið átjan ferðir størri eftir neyvar kanningar. Sostatt var fyrsta metingin ikki tað minsta á røttu leið.

À sama fundi, sum Poul Michelsen nevndi hálvu milliónina, vístu umboð fyri frælsan ítrótt á, at tað ongantíð var ætlanin at fáa rennibreyt um Tórsvøll, og tey roknaðu heldur ikki við, at hon fór at koma.

Tórshavnar býráð samtyki 6. apríl 2000, at Tórsvøllur skuldi vera fótbóltsvøllur burturav.



*Hendan tekningin vísir, hvussu Tórsvøllur eftir ætlan fer at síggja út við einari rennibreyt. Munandi færri áskoðarapláss vera, um ikki nýggj verða bygd afturat. Eingi áskoðarapláss vera við endan móti Gundadalshøllini, og eini áttahundrað færri pláss vera móti høllini á Hálsi.*

Hóast arbeiðið at fáa rennibreyt um Tórsvøll hevur fingið nýtt lív, so er tað í løtuni lítið, sum týðir upp á, at hetta verður veruleiki.

Tað eydnaðist okkum ikki ikki at fáa fatur á Poul Michelsen til eina viðmerking.



*Vinstrumegin Bjarna Djurholm hoyrist ikki longur vágamál. Dialektin er nú so suðuroysk sum tilber.*
*Mynd: Jens Kristian Vang.*

# Jacob funnið seg til rættis

Mikudagin var Jacob Vestergaard fyri fyrstu ferð í tinginum sum landsstýrismaður. Hann fær gamla plássið hjá Jørgen Niclasen á fremstu røð millum løgmann og Bjarna Djurholm.

Mikudagin var eisini móttøka fyri nýggja landsstýrismanninum í Tinganesi. Nógv fólk nýttu høvi at støkka inn á gólvið og heilsa upp á nýggja landsstýrismannin.

**-hr**

# Gera rundkoyring á Argjum



*Arbeiðið at gera rundkoyring á Argjum er farið ígongd.*
*Mynd: Jens Kristian Vang.*

Arbeiðið at gera rundkoyring við inngongdina til gomlu Argja kommunu er farin ígongd. Arbeiðið er eitt sindur seinkað, men tað skuldi ikki tikið tað nógva av tíð, áðrenn argjafólk skulu koyra runt fyri at sleppa avstað.

**-hr**

# Hálkan kom óvæntað

Hálka var orsøkin til, at ein bilur tíðliga hósmorgunin fekk skaða sunnanfyri sund.

Bilurin var á veg suðureftir, tá bilurin varð slongdur runt, og bilurin fekk nakað av skaða framman.

Vakthavandi á Politistøðini í Havn sigur, at orsøkin til óhappið var hálka. Sagt verður, at hálkan kom óvart á bilføraran. Hósmorgunin var hált í støðum, og hetta høvdu fleiri bilførarar ikki væntað.

Eingin fólkaskaði hendi orsakað av óhappinum.

**-hr**



*Tað kann enda galið við hálkuni*
*Mynd: Jens Kristian Vang*